## DAGSINS MEINING

# Orðaskifti og framtíð

Nú bíðað verður eftir úrslitinum av tí triðju boringini eru fleiri farin at seta spurnartekin við gongdina. Hóast politikarar fyri mongum árum síðani góvu oljuleitingini/oljuvinnuni grønt ljós, eru tað mong, ið kenna hesa nýggju vinnu sum nakað duldar- og vandafult. Soleiðis vil tað altíð vera við tí nýggja.

Tað var í ringu kreppuárunum, at nógv varð tosað um at fáa samfelagnum fleiri bein at standa á. Lágir fiskaprísir og vánaligur fiskiskapur merktu samfelagið so meint, at dreymurin um eina oljuvinnu gjørdist klárvakin. Síðani hava náttúran og gerandisdagurin verið okkum til vildar og skapt høgan livifót og arbeiði til allar hendur. Tørvurin í løtuni at fáa samfelagnum fleiri nýggj bein at standa á er tí ikki heilt tann sami. Tó vita vit ikki, hvat framtíðin hevur at bjóða. Tað er eisini við hesi framtíð fyri eygað, at vit eru farin at vita, um ríkidømi finst í undirgrundini. Og skilagott er borið at, tí samfelagið hevur enn ikki gjørt stórar íløgur í nakað vit enn ikki vita er tilsteðar. Ístaðin hava vit ment okkara egna førleika soleiðis at tað hevur eydnast á ein stýrdan hátt at fáa útlendsk feløg at gera íløgur í leiting eftir umrødda ríkidømi. Hertil og ikki longur eru vit komin.

Tað eru so tey, ið vísa á, at vit longu áttu at havt fyrireikað okkum til nýggju avbjóðingina, og summi bera ótta fyri, at vit longu eru ov sein á sjóvarfallinum. Í samrøðu við blaðið herfyri gjørdi kvinna, ið hevur gjørt serritgerð um sosial árin av oljuvinnu, greitt, at longu vónirnar til eina slíka vinnu bera broytingar og avbjóðingar við sær. Hvussu og ikki so er skilagott og rætt at fáa eitt orðaskifti - ein dialog um hesi viðurskifti nú. Kanska longu um nakrar fáar dagar ella vikur er greitt, um vit eru vorðin ein verulig oljutjóð, og tað er út frá tí sannroynd, at vit mugu seta út í kortið tvs. spyrja okkum sjálvi, hvat vit vilja víðari. Tað liggur so eisini í kortunum. Hvat vit enn halda um einstøku niðurstøðurnar so var sendingin í SVF mánakvøldið eitt gott íkast til umrødda orðaskifti. Vit mugu tola, at fólk eru besøgin og leggja fram víttgangandi sjónarmið. Politikarar eiga at hava breiðan rygg og venda kritikki til nakað skilagott. Hvør einstakur av okkum hevur nakað gott uppá hjarta, og tað er hetta vit skulu prioritera og dyrka. Eisini fáa nakað positivt burtur úr tí negativa og tí krittiska.

Fyrispurningur er settur á tingi um málið, og tað er eisini gott, hóast adressan kundi verið eitt sindur breiðari. Hvat kann ein oljumálaráðharri siga um sosial árin! Nettupp tað vísir, hvussu komplext málið er, men harfyri er ikki sagt, at tað ikki ber til at loysa upp fyri tí og fáa nakað gott burtur úr.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eitt genialt uppskot frá Miðflokkinum

**Bill Justinussen**
*Form. Miðfloksins*



Uppskot Miðfloksins um fólkaatkvøðu um blokkin er genialt. Tað kann loysa samgonguna úr tí óvissu, sum hon hevur verið í seinastu 3 árini. Og sum í grundini allir føroyingar eru í, nevniliga: hvar standa vit í spurninginum um ríkisrættarligu støðuna. Uppskotið er genialt, tí tað er fullkomiliga óbundið at tí kegli, sum annars hevur verið um, at vit við eini fólkaatkvøðu antin siga ja ella nei til ríkisfelagsskapin. Við fólkaatkvøðu um niðurskurðin av blokkinum fáa vit at vita, hvar føroyingar standa, samstundis sum vit ikki á nakran hátt spæla bind og loys við danir.

**Nú hevur samgongan møguleikan**
Hóast Óli Breckmann í Degi og Viku týskvøldið (helst sum umboð fyri samgonguna) royndi at snúgva sær undan við populerum vendingum sum "at politikkarar eru valdir at taka óbehagiligar avgerðir", so hevði tað avgjørt verið skilagott av samgonguni at tikið undir við uppskotinum. Vallyftini til seinasta val kundu ikki misskiljast: spurningurin um framtíðarstøðu Føroya skuldi avgerast við fólkaatkvøðu. Og frá fyrsta degi hevur hendan samgongan jabbað um hesa atkvøðu og gjørt alt fyri at sannføra føroyingar um, hvussu stórt hennara demokratiska tilvit er. Nú hava tit møguleikan fyri at prógva trúvirðið.

Og hvat so, um tað er ein andstøðutingmaður, sum hevur lagt uppskotið fram. Hetta er ikki eitt uppskot, sum samgongan kann leggja fram, tí hetta liggur langt undir tey mál, sum hon hevur sett sær. Men hinvegin fáa tit eitt svar, sum tit kunnu brúka til nakað, um tit lata Føroya fólk siga sína hugsan um hesi viðurskifti. Lítið ikki á, at veljarakanningar loysa hesar gáturnar fyri tykkum. Bara ein verulig fólkaatkvøða kann geva eitt veruligt svar.

**Kann samgongan atkvøða ímóti?**
Í ringasta føri kunnu tit lata vera við at atkvøða ímóti, so ger andstøðan arbeiðið fyri tykkum og samtykkir uppskotið. Spurningurin er, um samgongan kann loyva sær at atkvøða ímóti. Ger hon tað, vil tað helst føra við sær, at hon prógvar fyri øllum føroyingum, at hon ikki er sinnað yvirhøvur at lata føroyingar siga sína meining um nakað í framtíðarstøðuspurninginum. At hon onki meinar við fólkaræði, og at hon ikki torir at hoyra sannleikan. Minnist til: tað var samgongan, sum lovaði fólkaatkvøður, ikki eina men heilar tvær.

# Veljarakanningin

**Rúna Sivertsen**
*løgtingskvinna*



**Ein av spurningunum hjá Fynd í veljarakanningini fyri Dimmalætting og Útvarp Føroya er manipulerandi og kann hava avlagað úrslitið av kanningini.**

Spurningurin, eg sipi til, er hesin:

Ert tú fyri víðkaðum sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin og undir donsku grundlógini?

Helst munnu tey fægstu vita, hvat ein víðkað skipan innan ríkisfelagsskapin og undir donsku grundlógini í veruleikanum merkir fyri Føroyar.

Skal svarið uppá ein slíkan spurning vera eftirfarandi, er neyðugt at fólk vita, hvat broytingin førir við sær.

Fyri mær er tað ófatiligt, at Fynd, sum má roknast at vera mannaður við professionellum fólki, ikki upplýsir fólk um, hvørjar álvarsligar avleiðingar ein slík avgerð fer at fáa fyri Føroyar.

*Ein skipan undir donsku grundlógini merkir, at Føroyar gerst danskur landslutur. Hetta hevur við sær, at Føroya fólk við hesi skipan, frásigur sær sín tjóðskaparliga sjálvsavgerðarrætt. Hervið missir Føroya fólk rættin til evsta lóggávuvald í Føroym, rættin til at umboða seg sjálvt sum tjóð í altjóðasamfelagnum, og Føroya fólk missir eisini yvirvalds- og ognarrættin til alt tilfeingi í Føroyum, t.d. olju og onnur møgulig ráevni í undirgrundini.*

Hetta er í hvussu er, hvat serfrøðingar siga, og enn havi eg ikki sæð nakað, sum týðiliga og greitt afturvísir teirra útsøgnum.

Eg haldi, at tað minsta mann kann krevja, tá Fynd ger veljarakanningar fyri ein almennan stovn sum Útvarp Føroya, at fólk verða upplýst um, hvat tað er tey í veruleikanum verða spurd um.

Ikki trúgvi eg, at 54 prosent høvdu svarað ja uppá spurningin um víðkað sjálvstýri og undir donsku grundlógini, vistu tey at rættindi okkara vórðu mist nú og í framtíðini, fyri okkum og okkara eftirkomarar.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Skeiv og vandamikil veljarakanning. Eru eingi sambandsfólk til meira?

**Carl August Arge**
*Limur í Hesuferð (skrivi sjálvur)*



Hendan seinasta veljarakanningin hjá Dimmalætting og Útvarpinum, gjørd av Fynd 19. og 20 september, er meira enn løgin. Hon gevur eina heilt skeiva mynd av hvar føroyska fólki stendur í sjálvstýrismálinum.

Tað er helst einki tekniskt galið við kanningini, men tann ella tey sum hava orðað spurningarnar duga antin ikki síni ting ella vilja tey geva okkum eina sera maniupuleraða mynd av veruleikanum.

Ja, eg vil pástanda at hon er beinleiðis vandamikil fyri eina sunna politiska tilgongd. Eg skal grundgeva fyri hesum.

Tað eru spurningarnir 4 og 5 pluss tað at ein ella kanska tveir spurningar ikki verða settir sum samantikið geva eina heilt skeiva fatan av støðuni í sjálvstýrismálinum. Ikki minst gevur kanningin teimum sum ganga inn fyri eini meira hovligari sjálvstýristilgongd eina falska trygd fyri at teirra áhugamál verða væl vard í einari møguligari komandi samgongu millum javnaðarflokkin og sambandsflokkin.

Tú kanst síggja alla kanningina á heimasíðuni hjá Útvarpinum undir Ymiskt.

**Spurningur 4: Í apríl samtykti løgtingið eina fullveldisætlan. Henda miðar ímóti at yvirtaka málsøki fram til 2012, skerja blokkstuðilin 350 mió. kr. frá árskiftinum, og stovna ein búskapargrunn, sum skal tryggja eina skiftistíð fram til 2016. Taka tygum undir við hesi samtykt?**
38 % svara ja.
53% svara nei.
9 % hava onga støðu.

Hetta er alt púra greitt. Sera ítkøligur spurningur og eingin ivi um hvat fólk taka støðu til.

Men so kemur næsti spurningur.

**Spurningur 5: Sum aternativ hevur verið borið upp á mál eitt víðkað sjálvstýri innanfyri ríkisfelagsskapin og undir danskari grundlóg. Er tað møguleiki, tygum kunnu ganga inn fyri?**
54 % svara ja.
38 % svara nei.
11 % hava onga støðu.

Í mun til fyrra spurningin er hesin ógvuliga almennur og breiður. Spurningurin kan svarast játtandi av einum sera breiðum skara av fólki. Líka frá teimum sum kunnu ganga allan vegin við núverandi samgongu heilt til sjálva fullveldistøkuna og til inkarneraði sambandsfólk, sum við minstu lítlu yvurtøku um 25 ár, síggja eitt víðkað sjálvstýri.

So eru ikki fleiri spurningar um hvørja støðu fólk hava til okkara ríkisrættarligu støðu. Eg haldi at mann kan hava tvær atfinningar.

Tann minna atfinningin er at fólk sum annars kunnu fylgjast við ætlanunum hjá núverandi samgongu, men sum hava avgjørt longu nú at tey fara at atkvøða nei til sjálva fullveldistøkuna, væl kunnu hava svara ja uppá 5. spurningin. Hetta gevur eina ávísa ósikkurheit, men hon er kanska ikki so stór.

Tann stóra atfinningin er at eingin spurningur er settur fyri at meta um hvussu nógv fólk vilja varðveita núverandi støðu, t.v.s eru traditionell sambandsfólk.

Kanningin gevur tað fatan at í sjálvstýrisspurninginum eru føroyingar í tveimum pørtum. Annar parturin, 38 %, styðjar sjálvstýrispolitikkin hjá núverandi samgongu og so er ein annar partur, 54 %, sum er fyri einum "víðkaðum sjálvstýri innanfyri ríkisfelagsskapin". Hetta leiðir eisini tankan til at hesi fólk hava eina positiva støðu til sjálvstýrislógina hjá javnaðarflokkinum. Og so eru 9 - 11 % sum ikki hava nakra støðu.

**Eg vil hevda at hetta er ein heilt skeiv mynd sum kan leiða nógv fólk at taka skeiva avgerð til komandi val.**

Spyr teg sjálvan: átti tað ikki at verið ein triði spurningur har fólk tóku støðu til at varðveitt núverandi støðu?

Áhugavert hevði eisini verið at haft ein fjórða spurning: hvussu nógv vilja at Føroyar gerast ein integreraður danskur ríkispartur (amtsstøðu).

Ein og hvør veit at hetta er politikkurin hjá sambandsflokkinum og leiðandi fraktiónini í javnaðarflokkinum og at nógv fólk eru sum vilja varðveita núverandi støðu, **men kanningin fangar als ikki hesa hugsanina!**

Eitt skot uppá hvussu hvussu kanningin kundi sæð út:

**Tekur tú undir við núverandi fullveldisuppskotið:**
38% svara ja.

**Tekur tú undir við einum víðkaðum sjálvstýr innanfyri ríkisfelagsskapin?:**
25% svara ja.

**Tekur tú undir við at ríkisrættarliga støðan skal verða óbroytt?**
15% svara ja.

**Hevði tú vilja at Føroyar fingu støðu sum integreraður danskur landspartur (amt)?**
11 % svara ja

**Ikki tikið støðu**
11 %

Pluss og minus nøkur prosent her og der so trúgvi eg støðan er nakað soleiðis.

Tað sum er tað manipulerandi og vandamikla við hesi kanning er at øll tey sum **veruliga vilja hava eitt víðkað sjálvstýri** innanfyri ríkisfelagsskapin halda at væl stendur til tá tey síggja hesa kanningina; tey kunnu lættliga hugsa at um tey velja javnaðar- ella sambandsflokkin so fáa tey eina samgongu sum fer at gjøgnumføra stórar broytingar á sjálvstýrisleið. Kanningin gevur teimum fatanina at tey eru partur av 54% av fólkinum sum vil hava eitt veruligt víðkað sjálvstýri.

**Og tað er ikki satt!**

Um spurt var eftir hvussu nógv vóru sambandssinnaði hevði verið púra greitt at ein samgonga við javnaðar- og sambandsflokkinum hevði verið ein samgonga har tey sum ikki vilja hava nakra broyting høvdu verið í fleirtali. Tað hevði verið greitt at ein sjálvstýrissinnaður sum atkvøður fyri javnaðarflokkinum atkvøður fyri einari samgongu sum fer at føra reinan sambandspolitik. Tað eru longu leiðandi javnaðartingmenn sum alment vilja hæðkað blokkstuðulin aftur. Er veruliga nakar sum trýr at sambandsflokkurin í einari samgongu við javnaðarflokkin fer at ganga við til nakran veruligan sjálvstýrispolitik? At sambandsflokkurin fer at ganga við til at veruleikagerða eina Sjálvstýrislóg sum er verd navnið?

**Og tað hevur ómetaliga stóran týðning at øll sjálvstýrissinnaði eru púra greið yvir hetta so at teirra atkvøða ikki enn ferð fer til at styðja ein flokk sum rekur sambandspolitik.**

Vit eru á einum rættuligum vegamóti í føroyskum politikki og komandi løgtingsval hevur ómetaligan týðning fyri sjálvstýristilgongdini. Komandi val verður valið har avgjørt verður um vit skulu taka nøkur stór og avgerandi stig á sjálvstýrisleið ella um vit skulu standa í stað og trampa og enn í nógv ár hvørki vera fuglur ella fiskur.

Støðan krevur ómetaliga nógv av okkara politisku búning. Skulu vit koma á mál verða tað sjálvstýrisflokkarnir sum mugu gera arbeiði. Hetta krevur at flokkar sum í grundini eru sera ólíkir mugu arbeiða saman og gerða nógvar neyðsemjur. Og tað slítur bæði uppá trúvirðið og arbeiðsgleiðina. Men sjálvstýrisflokkarnir mugu halda á í minst 4 ár afturat.

Harafturat krevur støðan at nógv sjálvstýrissinnaði javnaðarfólk hesuferð avgerða at atkvøða taktiskt. Hesi fólk mugu gerða upp við seg sjálvi um tey ikki heldur eiga at velja ein av sjálvstýrisflokkunum enn tann flokk tey helst vilja styðja.

Tað besta hevði sjálvandi verið tann sonevnda "breiða samgongan" har javnaðarflokkurin var við til at veruleikagerða eitt føroyskt sjálvstýri sum er vert navnið. Tað eru tíanverri neyvan nakrir møguleikar fyri hesum við núverandi javnaðarleiðslu og tí mugu tey sjálvstýrissinnaðu javnaðarfólkini gerða upp við seg sjálvan at atkvøða taktiskt. Tað átti ikki verið ógjørligt hjá javnaðarfólki at atkvøtt fyri t.d. sjálvstýrisflokkinum ella kanska tjóðveldisflokkinum. Almannapolitikkurin hjá hesum flokkum er ikki so langt frá javnaðarhugsanini.

Eitt annað kan sjálvstýrisvongurin í javnaðarflokkinum gera: krevjið at flokkurin uppstillar støðuføst og trúverdug sjálvstýrisfólk í valdømun har tey hava ein kjans at blíva vald. Noktar flokkurin hetta; ja so vita tit enn betur hvussu landið liggur.....

# Vit gera alt ov lítið viðgongur samgongan

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Við hesum roynir samgongan, at noyða kommunurnar til at yvirtaka mál, sum eru landsuppgávur.

**Feskasta dømi er koyringin til varda verkstaði í Vági.**
Leiðarin á serstovnadeildini sigur at pengarnir ikki strekkja til m.a. tí lønarútreiðslur eru blivnar so høgar, at tað slær botnin undan játtanini.

Hetta veit fíggjarmálaráharrin og samgongan fullvæl, tí tey hava sjálv játta hesar lønahækkingar og vita tí eisini, at játtanin til serstovnadeildina má hækkast fyri at halda tørn og fyri at hava, í minsta lagi, sama støði sum hevur verði.

**Skerjing av heimahjálp til reingerð**
Í summar var reingerð ikki gjørd hjá óhjálpnum fólkum tí játtanin m.a. ikki strekti til.

**Samgongupolitikkur**
Við hesum politikki ímóti m.a. óhjólpnum fólkum roynir samgongan, sum hevur metyvirskot, at kroysta og tvinga kommunurnar, sum ikki hava nakað yvirskot, at yvirtaka hesi mál, tí tað er kommunurnar (nærumhvørvi), sum síggja avleiðingarnar av hesari jagstran frá samgonguni ímóti óhjólpnum fólkum og ikki politikarnir í samgonguni, sum sita heitt og gott í løgtinginum og landstýrinum.

Hetta er landsuppgávur, so- harra fíggjarmálaráharri og samgongan-hvar er logikkurin í at siga, at vit hava ráð til at siga nei takk til 356 milliónir, men mugu spara 1/4 mill. burtur til tey av okkara medborgarum, sum ikki klára seg sjálvi?

Svarið má verða, at her er eingin logikkur.

Nú er stundin komin har allir sjálvstýrissinnaðir føroyingar mugu gerða upp við sjálvan og skilja hvat støðan krevur av okkum. Hetta er tíðin tá einki má koma í vegin fyri veruleikagerðini av okkara tjóðskaparliga frælsi. Hetta er tíðin tá allir partar á sjálvstýrisvonginum mugu vera til reiðar at slaka og gerða tær neyðugu neyðsemjurnar. Gerða vit hetta blíva vit endaliga eitt land har tað ber til at føra veruligan politik ogtá kunnu vit leggja hetta lemjandi tjóðskaparstríði aftur um okkum.